# dan nazismuni

**Næstu ferð:**
*Doru á Torvlaðnum úr Rumenia*



*at eg fór til Keypmannahavnar at lesa eftir lokið studentsprógv í Týsklandi. Eg vildi t í Føroyum seinastu 31 árini.*

*Mynd: Bárður Lydersen*

millum ár og dag hevur skrivað nógvar greinar um mál og navnafrøði til útlendsk tíðarrit, og skrivingin við síðuna av arbeiðinum hevur verið eitt ítriv, honum hevur dámt sera væl.

### Stórabeiggja-kompleksið?

Eftir 31 ár í Føroyum skuldi Ulf Timmermann havt fortreytir fyri at úttala seg um føroyska samfelagið, og spurdur, hvørji høvuðseyðkenni hann hevur varnast gjøgnum árini í Føroyum, dregur Ulf ymisk føroysk lyndiseyðkenni fram.

- Føroyingar elska at hoyra onnur rósa teimum. Sum útlendingur verði eg ferð eftir ferð spurdur, um tað ikki er gott at vera í Føroyum, og tað er eins og fólk beinleiðis fiska eftir rósi frá teimum útlendingum, sum koma hendavegin. Fatan mín er, at hetta lyndið møguliga kemst av einum gomlum stórabeiggja-kompleksi, sum føroyingar hava yvirfyri Danmark, sigur Ulf Timmermann við einum skeivum smíli. Men so gerst hann aftur meiri álvarsamur.

- Eitt annað eyðkenni føroyinga er, hvussu stóran leiklut familjan hevur í tykkara mentan og sosiala lívi, og hóast vit hava vinir her á landi og kenna nógv fólk, er tað skjótt at koma at standa eitt sindur uttanfyri, tá ein ikki hevur familju í landinum, sum støðan jú er hjá okkum. Hóast mong góð forhold við fleiri føroyingar er talan altíð um eitt mark fyri sosiala sambandinum, so leingi man ikki er í familju. Í Føroyum er familjan í fremstu røð, greiðir Ulf Timmermann frá. Hann leggur afturat, at júst hesin sentrali familjuleikluturin í føroyskari mentan er eisini at finna í ávísum økjum í Svøríki, haðani kona hansara er, men í t.d. Týsklandi hevur familjan als ikki sama sentrala leiklut.

- Og til seinast kann eg nevna, at føroyska samfelagið í ein mun er eyðkent av løtuvinningum. Føroyski mentaliteturin ber í ein mun brá av løtuvinningum fram um langsiktaðar vinningar. Hetta stuttskygni er eftir mínum tykki t.d. sjónligt í politikki og vinnulívinum, metir Ulf Timmermann.

### Nazitýskland

At verða føddur í Týsklandi í 1941 er í sær sjálvum nakað, sum fær tey flestu at rakna við. Annar Veraldarbardagi var júst brostin á, tá Ulf varð borin í heim í Norðurtýsklandi, og Ulf er ikki bangin fyri at siga, at kríggið hevur havt stóra ávirkan á hansara nationala samleika. Hóast hann hevur livað í Føroyum seinastu 31 árini, hevur hann fylgt væl við gongdini í týska samfelagnum, men hann undirstrikar samstundis, at hansara tjóðskaparkensla ikki hevur nógv rúm.

- Men hóast mín samleiki sum týskari ikki er serliga sterkur, havi eg ein sterkan regionalan samleika, sigur Ulf og sipar til barnaárini og heimstaðin í lokalsamfelagnum í Norðsjónum.

Ulf Timmermann sigur seg minnast endan á krígnum, og árini eftir kríggið standa sterk í minninum. Spurdur, hvat forhold hann í dag hevur til Seinna Veraldarbardaga, nazismuna og Adolf Hitler, fer Ulf Timmermann í holt við at greiða frá, hvussu hann hevur upplivað hendan søguliga sorgarleik.

- Hóast kríggið endaði í 1945, hildu tey somu fólkini í stóran mun fram í teimum somu sessunum, sum tey høvdu sitið á undir krígnum. Útskiftingin var ikki so stór, og tí var nazisman als ikki deyð í Týsklandi, hóast stóra fallið var farið fram. Eg upplivdi tí leivdirnar av krígnum gjøgnum øll skúlaárini í Týsklandi, og upp ígjøgnum fólka- og studentaskúlaárini vóru t.d. lærarar, sum framvegis hildu fast um nationalsosialistisku hugsjónina. Hetta var ein óbehagilig tíð, greiðir ein opinskáraður Ulf Timmermann frá.

Lívið í Týsklandi eftir kríggið var á henda hátt sera nógv ávirkað av tíðarskeiðnum undir Adolfi Hitler, og hetta var ein av orsøkunum til, at hann fór til Keypmannahavnar at lesa eftir lokið studentsprógv. Ungi maðurin vildi burtur frá týskum trongskygni og út til meiri frælsi, sum hann sjálvur tekur til. Men hvønn leiklut høvdu foreldur hansara undir krígnum?

- Sum ungur var pápi sum so nógv onnur hugtikin av Hitler. Hann var sivilverkfrøðingur og arbeiddi á týskum skipasmiðjum, sum bygdu herskip, so orsakað av sínum arbeiði hevði ein ítøkiligan leiklut undir krígnum. Mamma var harafturímóti meiri skeptisk. Hennara stóra ynski var at fáa eina universitetsútbúgving, men undir krígnum vóru tað bert limir í nazistaflokkinum, sum fingu peningaligan stuðul. Hóast hennara stóra dreym um universitetið var mamma so mikið prinsippføst, at hon noktaði at melda seg inn í nazistaflokkin, og tí fekk hon ongantíð sítt ynski uppfylt og var heimagangandi húsmóðir alt sítt lív, sigur Ulf Timmermannm.

Móðir Ulf livir framvegis, og í mai mánaði í ár fylti hon 90 ár. Undir føðingardegnum fór hon at tosa um farnar tíðir og nevndi, at hon einaferð, í 1935, sá Der Führer. Og Ulf greiðir frá, at tað, sum stóð mammuni fremst í huganum, var, hvussu fantastiska bergtakandi eygu Hitlers vóru.

- Men sannleikin er, at hvørki mamma, pápi ella størsti parturin av týska fólkinum í 1930´unum vóru greið yvir, hvat í veruleikanum ætlað var. Hitler tosaði um at endurreisa Týskland og fyrst og fremst koma Versaillessáttmálanum til lívs, sum líka síðani Fyrra Veraldarbardaga hevði avmarkað rættindini hjá týsku tjóðini. Adolf Hitler vildi koma stóra týska arbeiðsloysinum til lívs og endurreisa búskapin, og tá hann við stórari succés fekk vent búskaparligu gongdini, kveikti hann eina vón og tendraði ein anda í fólkinum, sum gav honum møguleikan til at halda fram. Hitler hevði sum kunnugt fantastisk evni at forføra, og størsti parturin av týska fólkinum visti einki ítøkiligt um jødatýning, Holocaust og Auschwitz, sigur Ulf Timmermann.

Hann leggur afturat, at týska fólkið í veruleikanum varð í trimum bólkum undir Hitler: ein lítil minniluti, sum gjørdi mótstøðu. Ein sera stórur líkasælur miðalbólkur, og til seinast ein minniluti, sum av øllum alvi aktivt stuðlaði Hitlerstjórnini.

- Sorgarleikurin er, at tann stóri miðalbólkurin, sum í veruleikanum var nógv tann størsti parturin av íbúgvunum í Týsklandi, atkvøddi fyri Hitler í 1933, sigur Ulf Timmermann afturlítandi.

Men tíðin lekir øll sár, og Ulf metir, at við tíðini er Annar Veraldarbardagi í størri mun vorðin ein søgulig hending heldur enn eitt persónligt trauma. Hann metir tað vera týdningarmikið fyri týska fólkið at fyrihalda seg opið til tað, sum hendi, tí mong hava lyndi til at gloyma, fortreingja og strika árini frá 1933-1945 úr heimssøguni.

- Men hinvegin eru onnur, sum bert tosa um árini millum 1933 og 1945, sum um øll heimssøgan er farin fram hesi 12 syrgiligu árini, og tað er at fara í hina grøvina, sum t.d. bretarnir eru herviligir til. Alt skal síggjast í eini heild, og vit skulu minnast til, at týska søgan er altso yvir 1100 ár, slær Ulf Timmermann fast.

### Føroyar er heimið

Prátið er at enda komið, og Ulf bjóðar kurteisliga seinastu smákøkuna, áðrenn vit skiljast. Í einum seinasta spurningi um framtíðarætlanir hansara sigur Ulf:

- Okkum hevur dámt sera væl í Føroyum, annars høvdu vit jú ikki havt verið her øll hesi árini. Fyri meg hevur tað havt stóran týdning, at børnini hava fingi loyvi at vaksa upp í so tryggum og góðum umstøðum, og hóast tey nú øll fýra eru vaksin og fáa ella hava fingið sær útbúgving á universitetum uttanlanda, kundu eg og konan hesi árini á ongan hátt ynskt okkum aðrastaðni enn í Føroyum, sigur týski latínlærarin og navnafrøðingurin at enda.